# Havnará, fólk og fæ gjøgnum tvær øldir (1830-2024)

fróðskapur
Faroe University Press
Fróðskaparrit 71 (2025), nr. 2: 63-95
Náttúra og náttúrufatanir í Føroyum
©The Author(s) 2025 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
www.frodskapur.fo/

# The Stream of Tórshavn, Humans, and Animals Through Two Centuries (1830-2024)

**Tráin Petursson Nónklett**[1], ph.d.-lesandi, Søgu og samfelagsdeildin, Fróðskaparsetur Føroya

**Abstract**

In this article I examine the interaction between the Stream of Tórshavn ("Havnará"), humans and animals from approximately 1830-2024, drawing on the field of environmental history. The Stream of Tórshavn was used for drinking water and washing until 1898. A new water system was established in the late 19th century since the stream was perceived as polluted. Subsequently, the stream was mainly used as a sewage system. When cars arrived in Tórshavn in the 1920s it was considered necessary to establish new roads. Due to pollution and the new traffic, sections of the stream were concealed from the 1920s and forward. In time, people began discussing reopening parts of the stream. In 1984 an architectural proposal was presented with the aim to reconstruct a part of the stream for aesthetic and recreational purposes. While this proposal was not implemented, a similar project was successfully executed in 2023. This article illustrates and discusses how the use and perceptions of a natural phenomenon – in this case a stream – changes and adjusts to different needs and wishes.

**Úrtak**

Í greinini lýsi eg samspælið millum Havnará, fólk og fæ í Havn frá áleið ár 1830 til 2024. Greinin tekur støði í umhvørvissøgu, har dentur verður lagdur á at kanna samanhangir millum menniskju og umhvørvi í søguligum sjónarhorni. Havnará var bæði matará og tváttá fram til 1898. Seinast í 1800-árunum varð hildið, at áin var dálkað og býurin fekk tí nýggja vatnveiting. Áin varð ikki longur brúkt sum matará, men í alt størri mun sum kloakk. Tá bilar komu til Havnar í

[1] T-postur: trainpn@setur.fo

1920-árunum varð hildið, at neyðugt var við nýggjum vegum. Dálking og nýggja ferðslan høvdu við sær, at partar av ánni vóru lokaðir frá seinast í 1920-árunum og fram. Við tíðini fóru fólk at kjakast um at lata ánna upp aftur. Í 1984 kom eitt arkitektuppskot um at endurskapa ein part av ánni við fagurfrøðiligum og trivnaðarligum endamáli. Uppskotið bleiv ikki framt í verki, men í 2023 varð ein líknandi verkætlan framd. Greinin lýsir og viðger, hvussu nýtslan og fatanin av einum náttúrufyribrigdi – í hesum føri eini á – broytist og lagar seg eftir ymsum tørvum og ynskjum.

**Keywords**: Havnará, Tórshavn, environmental history, perceptions of nature, stream, traffic, “matará”, “tváttá”, inscription.
**Leitorð**: Havnará, Tórshavn, umhvørvissøga, náttúrufatanir, á, ferðsla, matará, tváttá, innskrift.

## Inngangur

> Havnará, eller som den i det kommunale sprog hedder: Tórshavns elv, står nu foran sin udslettelse. Til at begynde med skal den overdækkes fra Værtshuset til Bringsnagøtu-broen, derfra æder udslettelsen sig til Storedambroen osv. Om føje tid er den en glemt kloak. Hermed forsvinder en idyl. (*Vinaliga, bind II.*, 2019, s. 105)

Soleiðis skrivaði rithøvundurin William Heinesen í brævi til vinmannin og rithøvundin Jørgen-Frantz Jacobsen í juni 1928. Hetta var tó hvørki fyrstu ella seinastu ferð at Havnará varð broytt av menniskjum.

Endamálið við hesi grein er at lýsa samspælið millum Havnará, fólk og fæ gjøgnum nærum tvær øldir.[2] Ein nágreinilig kanning av slíkum samspæli kann varpa ljós á  fjølbroyttar náttúrunýtslur og -fatanir gjøgnum tíðina, umframt at lýsa fólkalív og býarmenning. Hvat menniskju *hugsa* er týdningarmikið, men tað ber eisini til at lýsa náttúrufatanir við at kanna, hvat menniskju *gera*. Ætlanin er tó ikki, at hetta bert skal vera ein søga um menniskju. Greinin er eitt íkast til føroyska umhvørvissøgu, og roynt verður at taka djór og náttúrufyribrigdi við í viðgerðina.

Greinin fevnir um fýra tíðarskeið. Fyrsta tíðarskeiðið lýsir Havnará sum matará og tváttá fram til 1898, tá ið ein nýggj vatnskipan verður tikin í nýtslu. Annað tíðarskeiðið snýr seg um, tá ið Havnará varð brúkt sum kloakk hjá teimum, sum búðu nærhendis, og tá hon varð partvíst lokað frá seinast í 1920-árunum og fram til áleið 1970-árini. Triðja tíðarskeiðið fevnir um tíðina frá 1980 til 2000, tá ið tankar komu fram um at lata upp ella at endurskapa niðara part av ánni. At enda verður nýggja verkætlanin, sum varð liðug í 2023, lýst. Áin hevur eisini

---

[2] Greinin tekur støði í kandidatritgerð míni og einari universitetsuppgávu á Københavns Universiteti (Nónklett, 2020, 2021). Eg takki ritstjórn og javnlíkametarunum fyri viðkomandi og gevandi viðmerkingar, og teimum, sum hava lisið og gjørt viðmerkingar til greinina.

verið brúkt til annað, m.a. varð hon nýtt sum megi til kornmyllur (Nónklett, 2021, s. 31–36). Neyðugt er tó at avmarka meg, og tí viðgeri eg omanfyrinevndu høvuðstíðarskeið.

Nakað er skrivað um Havnará frammanundan. Nyholm Debess, Finnur Johansen og Andrias Ziska hava skrivað um Havnará sum vatnveiting og Johansen um lokan av ánni (Debess, 1927; Ziska, 1959, s. 106; Johansen, 1998, 2006, 2009). Finnur Johansen hevur skrivað bók um vatnveitingina í Havn frá 1898 til 1998. Í innganginum lýsir hann Havnará sum matará, sum hon var fram til 1898. Søgufrøðingarnir Jens Pauli Nolsøe og Kári Jespersen lýsa viðurskifti, sum hava við ánna at gera í *Havnar søgu*, m.a. brýr, kornmyllur, at áin varð brúkt at býta festigarð upp í 1674, at vatn varð tikið úr Havnará, um lokan av part av ánni og um reinføri (Nolsøe & Jespersen, 2004, s. 94–100, 160–163, 177–181, 2009, s. 310–314, 2023, s. 14, 132–139, 186–188). Søgufrøðingurin Erling Isholm hevur skrivað eina grein um Christian Pløyen, har hann lýsir avgerðir, sum Pløyen tók, meðan hann var landfúti í Havn, fyri at bøta um reinføri í býnum. Her stendur eisini ymiskt um Havnará (Isholm, 2013).

Keldutilfarið, sum greinin byggir á, er í høvuðsheitum tilfar úr føroyskum bløðum.[3] Talan er um kommunalar kunngerðir, útbjóðingar og tíðindaskriv, frágreiðingar frá býráðsfundum, blaðgreinar, samrøður og lesarabrøv. Tey kritisku lesarabrøvini fylla nógv, tvs. at ein rein á hevur fá lesarabrøv við sær, meðan ein dálkað á hevur nógv lesarabrøv og nógvar greinar við sær. Aðrar keldur eru ein ferðafrásøgn, ein lívfrøðilig kanning, gerðabøkur frá býráðsfundum, og harumframt eru brøv og greinar frá Williami Heinesen nýtt, sum hava góðar lýsingar av ánni og Havnini.

## Umhvørvissøga

Íblásturin til greinina kemur frá umhvørvissøgu. Sambært umhvørvissøgufrøðinginum Donald Worster er fremsta endamálið við umhvørvissøgu at skilja betur, hvussu menniskju eru ávirkaði av umhvørvinum í søguligum samanhangi, og hvussu menniskju hava ávirkað umhvørvið og úrslitini av hesum samspælinum (Worster, 1988, s. 290–291).

Ein týdningarmikil tanki í umhvørvissøgu er, at eisini náttúrufyribrigdi eru aktørar, tvs. eru við til at skapa søguna (Worster, 1988, s. 289). Ein aktørur hevur ikki neyðturviliga tilvit, men tær materiellu umstøðurnar hava týdning, t.d. tá ið veðurlagið broytist, áin floymir yvir áarbakkan ella hús brenna (Fritzbøger, 2009, s. 19). Slíkt kann hava eins stóran týdning og menniskjaligt tilvit ella tilvild.

Eg havi funnið íblástur í verkinum *Vandets veje: Skjern Ås miljøhistorie gennem 350 år* eftir søgufrøðingin Bo Fritzbøger (Fritzbøger, 2009). Fritzbøger vísir m.a. á, at menniskjanna samspæl við Skjern á hevði fleiri funktiónir fyri menniskjuni. Samstundis vóru eisini stríð, bæði stríð millum menniskju um

[3] Við at leita á www.tidarrit.fo.

nýtslu av ánni/vatninum og stríð millum menniskju og ánna. Stríð millum menniskju snúðu seg ofta um, at ein nýtsla av ánni hevði neiligar avleiðingar fyri aðra nýtslu, og hetta kundi skapa ósemjur (Fritzbøger, 2009, s. 81). Stríð millum menniskju og ánna snúði seg m.a. um, at áin floymdi yvir áarbakkan ella forðaði fyri ferðslumøguleikum (Fritzbøger, 2009, s. 47–54).

## Hugtakið innskrift

Eg nýti eisini eitt hugtak frá aktør-netverks ástøði (á enskum *actor-network theory,* stytt til ANT), sum m.a. sosiologurin Bruno Latour hevur staðið á odda fyri. Tað er enska hugtakið *inscription,* sum eg kalli *innskrift* á føroyskum.

Í grein frá 1990 nýtir Latour tøkniliga menningina av hotelllyklum sum dømi at greiða frá hugtakinum innskrift. Hann vísir á, at lyklarnir á nógvum hotellum eru tungir og troyttandi at hava uppi á sær.[4] Hetta er fyri, at gestirnir skulu lata lyklarnar inn aftur. Søgan er, sambært Latour, soleiðis: Nógvir gestir taka lykilin við sær av óvart, og hetta er kostnaðarmikið fyri hotellið. Hotelleigarin roynir seg fyrst við skeltum, har tað stendur, at neyðugt er lata lykilin innaftur. Hetta er ein innskrift. Hon hjálpir tó ikki tað stóra, tí nógvir gestir taka framvegis lykilin við sær og missa hann burtur. Hotelleigarin leitar sær tí hjálp frá einum íverkseta, sum ger lykilin tungan. Hetta hevur við sær, at fleiri hotellgestir lata lykilin inn aftur, tí hann er tungur at hava við sær. Íverksetin leggur við hesum eina innskrift afturat. Innskriftin var fyrst ein tekstur á einum pappíri á einum veggi, nú er innskriftin, umframt tekstin á pappírinum, eisini økta vektin á lyklinum (Latour, 1990, s. 104–110). Harvið hendir tað, ið á ANT-máli verður kallað ein *semiotisk materiell umseting*. Semiotisk, tí økta vektin ber týdningin "avhenda lykilin" og materiell tí lykilin er ein fysiskt tungur lutur, sum eisini ber týdningin "avhenda lykilin" (Blok & Jensen, 2011, s. 170; Law, 2019, s. 1).

Hetta er somuleiðis ein roynd hjá Latour at vísa á, at ikki bert menniskju kunnu vera aktørar. Tað kunnu lutir eisini vera, og tí snýr søgan seg ikki bara um ein framskygdan hotelleigara ella íverkseta, men um, hvussu bæði menniskju og lutir (t.d. vektin á einum lykli) kunnu ávirka umstøður og hendingar (sí t.d. Latour, 1996, 2005, s. 52–53).

## Tíðarskeiðið áleið 1800-1898: Havnará sum matará og tváttá

Matará og tváttá eru tvey gomul føroysk hugtøk, sum viðvíkja áarnýtslu. Matará er áin, haðani vatn til matgerð varð tikið, meðan tváttá er áin, har klæði vórðu vaskað. Tað kundi væl vera sama áin (J. P. Joensen, 2020, s. 232), og soleiðis var í Havnará. Tað er trupult at meta um, hvussu leingi Havnará hevur verið matará og tváttá, men sannlíkt er, at hon hevur verið tað leingi. Hon liggur væl fyri í mun til búsetingarnar við Tinganes, og hon var nóg stór til at vera matará og tváttá.

[4] Lyklarnir eru ofta øðrvísi í dag, men dømið kann kortini nýtast fyri at skilja hugtakið.

Mynd 1.
Brot av korti frá áleið 1800, sum Chr. Ludvig Ulrich von Born kapteynur teknaði av Havnini. Áarløkir av Húsareyni renna saman og gerast til Havnará. Á kortinum er Havnará blálig. Á Vaglinum fór áin fram til 1920-árini í tvey. Tann størra áin rann út í Eystaruvág, har Sandurin og Ósin vóru (fram til 1929). Tann minna áin, kallað Mylláin, rann út í Vestaruvág. Bygningar og hús eru reyð á kortinum. Tað grønliga er bøur.
© Historiske kort, Styrelsen for Dataforsyning og Infrastruktur




Christan Pløyen gjørdist landfúti í 1830, og fleiri av hansara kunngerðum vísa, at hann helt reinførið vera ov vánaligt í Havn. Sambært honum vaskaðu havnafólk klæðir, ull og fisk í ánni og arbeiddu við djóraskinni, umframt at kríatúr "endaðu sínar dagar við at bløða út í ánna" (Isholm, 2013, s. 10). Í desembur 1830 kunngjørdi Pløyen eina plakat, sum hevði til endamáls at tryggja reinari vatn í Havnará. Eitt mark skuldi setast í ánna og tað gjørdist eitt "M", sum ein jarnsmiður festi á ein stóran stein. Erling Isholm vísir á, at: "Plakatin ásetti, at alt dálkandi arbeiði skuldi gerast sunnan fyri M'ið, so reint drekkivatn fekst norðan fyri tað" (Isholm, 2013, s. 10). Varð kunngerðin brotin, var bótin ein markur, men fyri hvørt brot tvífaldaðist hon. Harafturat høvdu foreldur og húsbøndur ábyrgd av børnum og tænastufólkum (Isholm, 2013, s. 10). Hetta M'ið var ikki eitt beinleiðis fysiskt mark, men tað var ein innskrift, sum saman við plakatini og bótunum, bar týdningin matará omanfyri, tváttá niðanfyri.

Ein skotskur jarðfrøðingur var í Havn í 1856, og tá vórðu klæðir framvegis vaskaði í ánni og fiskur kruvdur. Hann lýsir ikki Havnina jaliga, og vísir á, at áin var "all disgraced with washings of clothes and eviscerations of fish" (Chambers, 1856, s. 12).

Sambært A. Ziska varð ein vatnbrunnur, kallaður "Ovastidammur", tikin í nýtslu hin 30. mai 1865. Vatnbrunnurin lá undir liðini av Løgtingshúsinum á Vaglinum. Miðskeiðis í 1800-árunum var hetta økið uttan fyri býin. Tá

Ovastidammur varð tikin í brúk, vaskaðu kvinnurnar klæðir undir fossinum frá og úr størra damminum (Ziska, 1959, s. 106). Tað hevur ikki eydnast at finna útav, hvørt tað júst var í mai 1865, at Ovastidammur varð tikin í nýtslu,[5] men við vatnbyrgingini varð ein nýggj innskrift tikin í brúk. Við vatnbyrgingini var talan um eitt sjónligari fysiskt mark. Trappur gingu oman í ánna, so tað var lættari at fara eftir vatni. Markið var harvið flutt, men boðskapurin var hin sami: Matará omanfyri, tváttá niðanfyri.

Tað vóru tó ikki øll, sum fylgdu avmarkingunum. Í oktobur 1881 boðaði politimeistarin frá í Dimmalætting: "at nogle Personer, ved at vaske i den af Kommunen opførte Vandbeholder i Thorshavns Elv, havde tilsmudsket Drikkevandet" ("Thorshavns Vandbeholder.", 1881, s. 4). Tey sluppu tó við eini ávaring á hesum sinni ("Thorshavns Vandbeholder.", 1881).

Í 1882 fekk Tórshavnar kommuna eina heilsuviðtøku, sum m.a. gav kommununi heimild at skipa reglur fyri drekkivatn. Kommunan hevði ábyrgdina av "[o]msorgen for Vandforsyningen", meðan ein heilsunevnd hevði eftirlit við vatnveitingini (Mitens, 1953, s. 67). Har vatn vanliga varð tikið - og tað var í vatnbyrgingini í Havnará, umframt í ánni Úti í Bø - gjørdist ólógligt at "vade derover, trække Kreaturer over, kaste Skarn eller Affald deri, eller vaske deri" og djór vóru ikki loyvd í damminum (Brendstrup et al., 1883, s. 2).

Neyvan vóru tað øll, ið fylgdu heilsuviðtøkuni, tí í juli 1888 kunngjørdi landfútin at: "Det forbydes herved paa det strængeste at vaske Fisk eller Uld i noget af Bassinerne i Thorshavns Elv ved den nye Bro mellem Skolegade og Sundsvejen" (Holm, 1888, s. 4). Aftur í 1894 varð víst á forboðið fyri at vaska fisk, ull ella innvølir í niðari dammi (Holm, 1894).

## Fæ í og kring ánna

Ein afturvendandi trupulleiki vóru húsdjórini. Tórshavnar kommuna viðtók í 1883 nøkur mørk fyri, hvar kríatúr máttu vera og ikki. Markið var býtt upp í tveimum: neyt og onnur stór djór; og flogfenaður. Fyri neytini og onnur stór djór skuldi fjarstøðan vera tríggjar alin, t.e. 1,88 metur frá ánni. Fyri flogfenaðin vildi býráðið "at Grænsen foreløbig kun ansættes ved Tinghusets nordlige Ende". Orsøkin var, at kommunan ætlaði at keypa jarðarstykki har, sum síðani skuldi hegnast inni, "hvilket i saa Tilfælde vil forhindre Gæs og Ænder fra ad den Kant at komme til Elven" (Evensen, 1883, s. 2). Um komið var fram á flogfenað innanfyri markið, fór hann at verða tikin og "vedkommende Ejer braget til Ansvar eller eventuelt Kreaturerne bortsolgte" (Brendstrup, 1883, s. 2).

Tað var tó ikki bara sum at siga tað at halda flogfenaði burturi. Árið eftir klagaði heilsunevndin í skrivi um, at áin varð dálkað av djórum, og at markið norðan fyri tinghúsið varð sett ov nær við vatnbyrgingina. Býráðið gav partvíst løgregluni skyldina, og royndi at verja seg við, at eitt mark var sett. Men: "saa har

[5] A. Ziska vísir ikki til keldur, og tað er ikki eydnast at finna savnindi á Tjóðskjalasavninum, ið lýsa hetta nærri.

dog siden saa vel Gæs som Ænder frit tumlet sig paa dette korte Stykke af Elven, uden at Politiet er traadt til, hvad heller ikke kan have undgaaet Sundhedskommissionens Opmærksomhed" (Evensen, 1884, s. 2). Dunnurnar og gæsnar løgdu tó lítið í, hvør myndugleiki átti ábyrgdina. Í 1885 var landfútin noyddur at leggja áherðslu á, at flogfenaður ikki hevði loyvi at vera í vatnbyrgingini í Havnará, og at eigarar av fuglunum fóru at verða ábyrgdaðir ella fuglurin seldur (Müller, 1885). Men heldur ikki hetta tykist at hava steðgað flogfenaðinum. Í lesarabrævi skrivar ein *Ego* í 1891, at:

> altfor ofte ser man i Elven paa det Sted og ovenfor det Sted, hvor man skal hente sit Drikkevand, ligge større og mindre Flokke af Ænder og Gæs. Kan det nu være i sin Orden, eller kan det være sundt at drikke Vand, der bliver hentet fra saadanne Steder, hvor Bunden ligger bedækket med Erkrementer [=Ekstrementer] fra disse befjedrede, snaddrende Skabninger? Behageligt eller indbydende er det i ethvert Tilfælde ikke. (Ego, 1891, s. 2)

Lesarabrævið hjá Ego var ein kritikkur av heilsunevndini. Til hetta svaraði ein annar lesarabrævsskrivari, at har longu var ein politiplakat, "hvori Ænder, Gæs og Høns bleve anmodede om at lade være at gaa i Vandet der, hvor vi tage vort Drikkevand" (Christophersen, 1891, s. 3). Plakatin var, sambært lesarabrævsskrivaranum í Dimmalætting, hongd upp á allar lyktapelar og kunngjørd í Dimmalætting. Trupulleikin var tó – og tað varð sagt í skemti av rithøvundinum – at fuglarnir bert lósu Føringatíðindi, har tað altíð stóð so nógv at lesa um djór (Christophersen, 1891, s. 3)! Eisini danski læknin Erik Faber skrivar í brævi frá 1897, at býurin, bæði í Havnará, á gøtunum og við Ósanum uddi av hønum og gásum (Faber, 1982, s. 4).[6]

Her ber til at taka ástøðið hjá Bruno Latour um innskriftir fram aftur. Hann vísir á at: "The strength of the statement thus depends in part on what is written on the sign, and in part on what each listener does with the inscription" (Latour, 1990, s. 104). Tó at lesarabrævsskrivarin skemtaði um, at flogfenaðurin ikki aktaði blaðkunngerðir og politiplakatir, so er eisini ein sannleiki í hesum. Flogfenaðurin var ein sterkari aktørur enn kám og ógreið fysisk mørk og innanhýsis ósemjur um ábyrgdarbýti. Harumframt tóku eigararnir ikki løgregluhóttanirnar í nóg stórum álvara. Boðskapurin var ikki nóg avgerandi í sjálvum sær. Tað snýr seg um, hvat verður gjørt við boðskapin, tí annars verður hann "reduced to a bit of paint on the piece of board" (Latour, 1990, s. 104). Ein munadyggari innskrift vildi í hesum føri verið at hegna drekkivatnsbyrgingina inni.

[6] Ósin og Sandurin verða ofta lýst sum sernøvn í samtíðini, og tí skrivi eg tey við stórum.

## Býurin fær nýggja vatnveiting í 1898

Í 1880- og 1890-árunum vórðu fleiri ónøgd við, at vatnið ikki var nóg reint. Tí fóru borgarar, serliga kvinnur, í 1890-árunum at savna inn pengar, til tess at gera nýggja vatnskipan. Kommunan tók síðani yvir og í 1898 varð nýggj vatnskipan liðug. Nýggja vatngoymslan nýtti ikki vatn úr Havnará.

Sambært Finni Johansen kannaði kommunan vatnið í Havnará í 1879 bæði evnafrøðiliga og mikroskopiskt. Úrslitið vísti, at vatnið var reint og bleytt, og harvið hóskandi sum drekkivatn og til matgerð (Johansen, 1998, s. 9–10). Heilsunevndin gjørdi tó vart við, m.a. í 1884, at tað hevði týdning, at kommunustýrið gav sær far um týdningin av reinum vatni, og mælti til “at lade lede Vand ind i Byen fra de i Byens Omegn værende Kilder”. Kommunustýrið helt seg tó ikki kunna gera nakað við málið júst tá (Evensen, 1884, s. 2–3). Helst hevur prát verið í býnum, tí áðurnevndi Ego vísti í 1891 á, at neyðugt var við nýggjari vatnskipan: “Er Sundhedskommissionen ikke i Stand til at løse denne Opgave, saa er det mit Haab, at Byens allerviseste Fædre ville gjøre Alvor af at faa gjennemført den paatænkte Vandledning” (Ego, 1891, s. 2). Í 1896 var eitt fólksligt trýst um at gera eina nýggja vatnveiting. Ein almenn umbøn gekk runt í býnum, har fólk kundu skriva undir og geva eitt peningaíkast til nýggja vatnveiting. Argumentið fyri at fáa nýggja vatnveiting var, at: “Elven stadig er belemret med badende og svømmende Gæs og Ænder, og Vandet efter heftige Regnskyl ligefremt er udrikkeligt” (“Vandledning i Thorshavn.”, 1896, s. 1). Eftir nakrar mánaðir vóru næstan 6000 kr. savnaðar inn (“Thorshavns Vandforsyning.”, 1896), sum má metast at vera ein stór upphædd tá í tíðini. Heldur enn “Byens allerviseste Fædre” (Ego, 1891, s. 2) vóru tað kvinnurnar, ið stóðu á odda fyri at savna inn peningin (Johansen, 1998, s. 10).

Endin var, at kommunustýrið tók yvir, og á heysti 1898 var nýggj vatnveiting liðug. Tá vóru vatnpostar settir upp í býnum, sum vóru ókeypis hjá fólki at brúka. Harafturat kundu fólk rinda fyri at fáa vatnrør beinleiðis inn í húsini (Johansen, 1998, s. 21–36). Tað er ikki neyðugt at viðgera vatnveitingina víðari, tí nú kom hon ikki longur úr Havnará. Tað áhugaverda í hesum sambandi eru argumentini fyri, hví neyðugt var við nýggjari vatnveiting, t.e. at fólk hildu ánna vera skitna, m.a. av flogfenaði og aftaná áarføri.

Smá 30 ár eftir, at nýggj vatnveiting varð tikin í nýtslu, tók rithøvundurin og politikarin Nyholm Debess samanum:

> Men Havnin tók til at vaksa. Fyrst tók hon tað mesta av innangarðs jørðini undir seg, og síðani ikki eiða sørt uttangarðs; men so við og við sum hon otaði seg niðan við Havnará, hoyrdist røddirnar hvøllari og ramligari ið kravdu, annað hvørt skitligheitina steðgaða, ella reinførheitina flutta longur niðan. Men hvørki var gjørligt. So ein dagin stóð dómur Stóradam’s á prent: Úr Havnará skuldi ikki eftirdags takast hvørkin mataløgur ella drekkivatn. (Debess, 1927, s. 2)

Nyholm Debess vísur á, hvussu Havnin var vaksin. Í 1801 búðu tað 554 fólk í Havn, meðan fólkatalið var vaksið til 1.656 fólk í 1901 (sí talvu 1). Neyðugt var tí at útstykkja longur niðan við ánna. Áður búðu tey flestu í økinum við Tinganesi. Í 1880-árunum varð m.a. útstykkja til sethúsabygging á Tinghúsvegnum við Løgtingshúsið (*Tórshavnar býaratlas*, 2007, s. 9). Nýggjar búsetingar nærhendis Havnará høvdu við sær eitt økt virksemi og trýst á ánna. Økta trýstið og virksemið hevur m.a. havt við sær "skitligheitina", sum Nyholm Debess kallar tað (Debess, 1927, s. 2). Harumframt broyttust jarðarviðurskiftini í 1800-árunum, og tá komið varð inn í 1900-árini, økist talið av jarðareigarum (Nolsøe & Jespersen, 2009, s. 113). Við traðunum komu húsdjór at ganga nærhendis ánni, umframt at dømir eru um taðing nærindis ánni.

Talva 1.
Fólkatalið í Havn árini 1801-1901 (B. Johannesen, 2008, s. 24).




## At vaska klæðir og taka vatn í 1890-árunum

Í brævi frá 1897 lýsir læknin Erik Faber m.a. støðuna viðvíkjandi drekkivatni í Havn. Hetta er stutt áðrenn, at vatnpumpur vórðu settar upp ymsastaðni í býnum, tvs. at Havnará var enn matará. Hann vísir í brævinum á, at tað í høvuðsheitum vóru kvinnur, sum tóku vatn. Hálvvaksnir menn, gamlir drongir og smágentur kundu eisini fara eftir vatni. Vatn varð serliga tikið á morgni. Danski læknin hevði tó hug at fýlast á, at havnafólk nýttu ov lítið av vatni. Hann metti orsøkina vera, at tað var torført at bera stórar nøgdir av vatni heim við (Faber, 1982, s. 5).

Í 1927 skrivar Nyholm Debess afturlítandi grein um Stóradamm.[7] Munur er á lýsing Fabers og lýsing Nyholm Debess. Sambært Faber vóru tað serliga ungar gentur og eldri kvinnur, ið heintaðu vatn, meðan Nyholm Debess vísir á, at tað serliga vóru eldri kvinnur og eisini børn og "gamlir dreingir", sum fóru eftir vatni (Debess, 1927, s. 2). Her er vert at hava í huga, at brævið hjá Faber er ein samtíðarkelda, meðan greinin hjá Debess er ein endurminning smá 30 ár eftir, at Havnará var nýtt sum vatnveiting.

At heinta vatn hevði eisini eina sosiala funktión, tí fólk heilsaðust og fullu í prát (Faber, 1982, s. 5). Nyholm Debess lýsir tað soleiðis: "Stóridammur var miðstøðan fyri øllum sum vert var at geva gætur. Tíðindini, bæði tey sum bóru gleðina við sær og tey sum sorgina hýstu, komu haðani." (Debess, 1927, s. 2)

At tváa var kvinnuarbeiði. Skipanin var, sambært Nyholmi Debess, at fín klæðir vórðu vaskaði beint niðanfyri Stóradammi undir fossinum, og síðani vórðu skitnari klæðir vaskaði longri oman eftir ánni. Klædnavask savnaði kvinnurnar, sambært Nyholmi Debess (Debess, 1927).

Tað er vert at geva sær far um, at tað í størstan mun vóru kvinnurnar, sum heintaðu vatn og vaskaðu klæðir, men tað, sum er skrivað, er frá monnum. Hetta er ein vansi við keldunum.

## Tíðarskeiðið áleið 1898-1980: dálking og lokan

"Men Havnin tók til at vaksa", eins og Nyholm Debess vísir á (Debess, 1927, s. 2), og tað gjørdi hon eisini í 20. øld. Vøksturin hevði stóra ávirkan á samspælið millum Havnará og havnarfólk. Í 1901 búðu 1.656 fólk í Havn, meðan tað í 1965 búðu heili 9.730 fólk í Havn (sí talvu 2). Fólkavøksturin skapti broytingar í landslagnum í 19. øld og enn størri broytingar í 20. øld við nýggjum búsetingum og vegum, eins og kortini vísa (samanber mynd 1 frá 1800, mynd 2 frá 1900 og mynd 3 frá 1964).

[7] A. Ziska nýtir í 1959 bæði heitini "Ovastidammur" og "Stóridammur". Nyholm Debess tykist tó ikki at gera mun á hesum báðum heitum, og nýtir bert heitið "Stóridammur". A. Ziska skrivar: "Brunnur til drekkivatn var gjørdur og tikin til brúks 30. mei 1865. Brunnurin fekk navnið >>Ovastidammur<<. Hann var tætt oman fyri brúnna millum Avhaldsbrekkuna og Tinghúsvegin. (...) Niðanfyri fossin undir >>Stóradammi<< og tí, ið rann oman í Vágsbotn, skolaðu kvinnurnar toy" (Ziska, 1959, s. 106).

Mynd 2.
Brot úr korti av Havnini, 1900. Tær grønu strikurnar eru "Ydre grænse for det dyrkede Land". Sum sæst á kortinum lógu summar av traðunum við Havnará.
© Historiske kort, Styrelsen for Dataforsyning og Infrastruktur



Talva 2.
Fólkatalið í Havn árini 1901-1970. Tøl fyri árini 1901-1950 eru frá (B. Johannesen, 2008, s. 24), tøl fyri árini 1960-1970 eru frá (Årsberetning 1971, 1972, s. 37).




Søgufrøðingurin John F. West hevur kallað tíðarskeiðið 1900-1928 fyri føroysku ídnaðarkollveltingina (West, 1974, s. 124). Naturaliubúskapurin hevði tó enn týdning, eisini í Havn, men við øktu fiskivinnuni komu fleiri pengar í umferð. Fiskivinnan tók av álvara dik á seg í seinnu helvt av 1800-árunum, og hetta helt áfram inn í 1900-árini. Sluppfiskiskapurin, sum byrjaði í 1870-árunum, og sum helt áfram til áleið 1940-árini, var tongdur at árstíðunum, og tí vóru nógvir fiskimenn burtur part av árinum. Samstundis vórðu fleiri traðir útstykkjaðar. Tey, sum vórðu verandi heima, tóku sær av landbúnaðinum, meðan sluppfiskimenninir vóru burturi (J. P. Joensen, 1975, s. 22). Um traðirnar í Havn skrivaði presturin Th. Sørensen í 1912 soleiðis:

> Intet Sted er iøvrigt Opdyrkningen i den Grad gaaet fremad som i selve Thorshavns nærmæste Omegn [...]. En Mængde af Thorshavns næringsdrivende Borgere har lagt betydeligt Arbejde og anvendt ikke smaa Summer paa at faa de af dem anlagte >>Trøer<< indhegnede Jordstykker drevet op til Mønsterbrug. (Th. Sørensen, 1913, s. 8–9)

Eftir seinna heimskríggj, serliga frá 1960-árunum, fór fram ein umfatandi urbanisering og fólkavøkstur, har nógv fluttu til m.a. Havnar. Tí gjørdist neyðugt at umleggja traðirnar til grundstykkir til húsabygging, og naturaliubúskapurin fekk líðandi minni týdning (West, 1974, s. 204–205, 233–234). Tey fyrstu áleið tretivu árini av 1900-talinum vórðu útstykkingar m.a. gjørdar við Niels Finsens gøtu, Tórsgøtu, Tróndargøtu og Rabarbukvarterið sum allar liggja nærindis

Havnará (*Tórshavnar býaratlas*, 2007, s. 20–21). Vinnulívið í Havn gjørdist eisini fjølbroyttari frá 1930-árunum við smáídnaði og handilslívi, og við heimastýrisskipanini frá 1948 vaks tann almenna fyrisitingin, sum varð staðsett í Havn (*Tórshavnar býaratlas*, 2007, s. 7–8). At býurin og fólkatalið vaks legði størri trýst á ánna, tí tørvurin á útstykking, vegum og kloakkering vaks.

Mynd 3.
Brot av korti av Havnini, 1964.
© Historiske kort, Styrelsen for Dataforsyning og Infrastruktur



## Havnará sum kloakk og frárensl

Nú fara vit víðari til, hvussu Havnará frá 1898 fór at verða nýtt sum kloakk og frárensl hjá havnarfólki. Havnará hevði enn støðu sum matará, tí har vóru nøkur fá havnarfólk, sum sambært landfútanum enn nýttu Havnará til vatnveiting. Ein traðarmaður hevði fingið bót seinast í 1890-árunum, tí hann hevði ikki fylgt heilsuviðtøkuni, sum segði, at tað ikki var loyvt at taða o.l. nærri enn tríggjar alin frá einum vatnbrunni í býnum. Traðarmaðurin viðurkendi ikki, at Havnará varð nýtt sum matará longur, og harumframt átti hann onga heilsuviðtøku, og tí visti hann seg ikki at hava gjørt nakað skeivt og kravdi endurgjald (En Trømand, 1901a). Í 1900 varð heilsunevndin biðin at kanna, um reglurnar, sum skuldu fyribyrgja dálking av Havnará, skuldu broytast nú nýggj vatnskipan varð sett í verk (Nolsøe & Jespersen, 2023, s. 186). Landfútin staðfesti í 1901, at áin framhaldandi skuldi haldast rein, og at Havnará framvegis var til vatnveiting:

> Der findes fremdeles i Thorshavns Elv et af Kommunalbestyrelsen oprettet, ikke senere nedlagt Vandforsyningssted, som ganske vist til daglig kun benyttes af enkelte Personer, men hvortil Flertallet af Beboerne vil være henvist, hvis der sker Brud paa Kommunens Vandbeholder eller Hovedvandledningen. Elven maa derfor fremdeles siges at være bestemt til Vandforsyning. (Engelstoft, 1901, s. 1)

Landfútin staðfesti eisini, at traðarmaðurin ikki kundi fáa endurgjald (Engelstoft, 1901). Traðarmaðurin tvíhelt tó um, at hann ongantíð hevði sæð nakran taka vatn úr Havnará síðani nýggja vatnveitingin varð liðug í 1898, og "utænkeligt er det, at nogen skulde foretrække dette til sine Tider med Gaaseekskrementer iblandede Vand som Drikkevand for Vandposternes dejlige Kildevæld" (En Trømand, 1901b, s. 2). Tað ber tí ikki heilt til at staðfesta, um summi framvegis nýttu Havnará sum matará, men alment var tað ikki loyvi at taða, blaka øsku o.l. í ánna.

Havnará var tó framvegis tváttá eftir 1898 og longri niðri í ánni haggreiddu fólk eisini fisk og onnur djór. Landfútin mælti av hesi orsøk eisini til, at áin framvegis varð hildin rein: "Det er for øvrigt ikke blot i Tilfælde af, at Vandledningen svigter, at man maa ønske at have en ren Elv. Ogsaa til daglig benyttes Elven til Rensning af Fisk og andre Næringsmidler samt til Tøjvask" (Engelstoft, 1901, s. 1). Hóast hetta er ymiskt, ið bendir á, at tað var trupult at halda ánna reina. Sama ár skrivaði ein í lesarabrævi, at áin var "snavset" (Thorshavner, 1901, s. 2).

Tað var serliga skrivað um dálking við niðasta partin av ánni, t.e. við Ósan og við Áarvegin. Fleiri orsøkir vóru til hetta. Í 1902 bannaði býráðið at tveita rusk á dungar í býnum, og vísti á, at tað heldur skuldi tveitast á sjógv (Nolsøe & Jespersen, 2009, s. 153). Hetta hevði, sambært lesarabrævsskrivara, við sær, "at Thorshavns-Elven siden den Tid har været Hovedbeholder for mange af de

omboendes Skarnbøtter" Hóast regnið kundi hjálpa við at fáa "frisk Vand i Elven", og "skønt det dækkede over Snavset", so var tað ikki "i Stand til at hindre de usunde Luftarter fra at stige op til Overfladen" Lesarabrævsskrivarin mælti tí frá at nýta ánna sum frárensl um summari (Borger, 1902, s. 2). Veðrið og árstíðirnar ávirkaðu, hvussu áin megnaði at føra burturkastið út á sjógv. Nakað, sum gongur aftur er, at lesarabrøv, ið fílast á ringan lukt, vóru í høvuðsheitum skrivaði summarmánaðirnar (t.d. Borger, 1902, 1910; "Býráðsóhumska í Havnará", 1950). Hesar mánaðir var minni avfall og tí rann verri burtur.

Tað vóru serliga húsini út við Áarvegin, sum tømdu tvagtunnur og nýttu Havnará sum kloakk fyrstu tíðini eftir 1898. Havnará var vorðin "selve Byens Kloak":

> Og selve Byens Kloak, Havnará, Hovedafløbet for adskillige af disse Render, hvor der fremdeles skylles og vaskes Tøj, deriblandt Sække for Købmandsforretningerne til Ifyldning af Mel, Sukker etc.! Eller dens værdige Affødning, Ósin, hvor Afløb fra Nødtørftshuse og Møddinger, Køkkenaffald, Petroleum, Tran, Tjære etc. etc. flyder dovent afsted i en giftig Blanding, hvor Ænderne snadrer, og Børn sopper om i. ("Vore sanitære Forhold.", 1912, s. 1)

Trupulleikin við ringum lukti helt áfram í nógv ár, hóast royndir vóru gjørdir at loka ánna ymsastaðni. Í 1950, tá ið arbeiðið við at loka ánna við Áarvegin var komið væl ávegis, stóð at lesa í grein í 14. September at arbeiðsmaðurin: "*Magnus Tórsheim* (...) letur illa at vatninum, sum stendur í ánni. Hetta er *kloakk*, ikki á, tók hann til. Vatnið er rotið" ("Havnará afturlögd", 1950, s. 4).

Havnará er partur av eini størri søgu um dálking í Havn. Landslæknin Hanus D. Joensen mælti í 1950 Tórshavnar kommunu til at "fáa opnar rennur, áir og veitir, sum liggja á býarökinum, afturlatnar". Her var "allskyns óreinska" í hesum áum, upplýsti hann fyri 14. September ("Landslæknin", 1950, s. 1). Ein av skitnu áunum var Havnará.

## "Tann nýggja tíðin" – niðasti partur av Havnará lokaður

Seinast í 1920-árunum varð fyrsti partur av Havnará lokaður, og síðani vórðu størri partar lokaðir so við og við. Lokanin varð ofta sett í samband við eina nýggja tíð, sum m.a. kravdi bøttar ferðslumøguleikar til tey nýggju akførini í býnum.

Sambært søgufrøðinginum J. R. McNeill eru bilar millum tøknina, sum hevði størstu sosialu og umhvørvisligu fylgjur í 20. øld (McNeill, 2000, s. 310). Eisini í Havn og fyri Havnará fingu bilarnir stóra ávirkan. Fyrsti bilurin kom til Havnar í 1922. Í 1960- og 1970-árunum økist talið av akførum í Havn av álvara. Í 1966 vóru 775 akfør skrásett í Havn, 10 ár seinni vóru 3.261 akfør skrásett, og við árslok 1980 vóru 4.419 akfør skrásett í Havn, harav 3.348 persónbilar (sí talvu 3 og 4).

Talva 3.
Skrásett akfør í Havn, úrvald ár 1922-1951. Í 1951 og 1953 eru motorsúkklur og knallertir skrásettar saman (Lagtingstidende 1922, 1923 Bilag II; Statistiske Efterretninger, 1933, s. 240; Statistiske Efterretninger, 1938, s. 291; Motorkøretøjer 31. December 1951, 1954, s. 46).

| Ár | Bilar | Motorsúkklur | Akfør tilsamans |
|---|---|---|---|
| 1922 | 1 | | 1 |
| 1933 | 39 | 0 | 39 |
| 1938 | 37 | 11 | 48 |
| 1951 | 179 | 55 | 234 |
| 1953 | 161 | 34 | 195 |

Talva 4.
Skrásett akfør í Havn, úrvald ár 1966-1980. Íroknað eru ikki skutarar. Í Årsberetning hjá Ríkisumboðnum verða skutarar ikki skrásettir ávíst stað, men fyri alt landið (Årsberetning 1965, 1966, s. 80; Årsberetning 1968, 1969, s. 97; Årsberetning 1972, 1973, s. 118; Årsberetning 1974, 1975, s. 63; Årbog for Færøerne 1976, o.á., s. 72; Årbog for Færøerne 1978, o.á., s. 109; Årbog for Færøerne 1980, o.á., s. 115).

| Ár | Lastbilar og vøruvognar | Bussar | Hýruvognar | Persónbilar | Motor-súkklur | Viðfesti-vognur | Akfør tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1966 | 238 | 5 | 89 | 228 | 215 | | 775 |
| 1969 | 263 | 4 | 120 | 644 | 206 | | 1.237 |
| 1973 | 328 | 4 | 104 | 1.423 | 87 | | 1.946 |
| Árslok 1974 | 419 | 12 | 113 | 2.026 | 52 | | 2.622 |
| Árslok 1976 | 550 | 7 | 104 | 2.539 | 61 | | 3.261 |
| Árslok 1978 | 745 | 4 | 114 | 3.071 | 67 | 34 | 4.035 |
| Árslok 1980 | 855 | 12 | 105 | 3.348 | 34 | 65 | 4.419 |

Ósin og niðasti partur av Havnará vórðu lokað seinast í 1920-árunum.[8] Áin var tó eisini broytt á ymsan hátt frammanundan, t.d. við at taka grús úr Havnará, og summastaðni í Havnará vórðu steingarðar lagaðir (Engelstoft & Finsen, 1907; P. C. Johannesen et al., 1909).

Í 1920-árunum arbeiddi býráðið við at gera eina nýggja kai við Eystaruvág ("Havneanlægget ved Thorshavn.", 1925). Danska Vandbygningsvæsenet hevði sum uppgávu at leggja ætlan fyri útbyggingini av nýggju havnini, og stovnurin mælti til, at partur av Havnará varð lokaður, fyri at knýta býin betur saman. Býráðið ynskti hinvegin at víðka um Áarvegin og at føra ferðsluna aðrastaðni. Stór ósemja var millum býráðið og Vandbygningsvæsenet um, hvat best var at gera, m.a. í mun til kostnað (sí t.d. "Havnaverkið í Havn.", 1926; "Havnen i Thorshavn.", 1928), men í 1928 gjørdist loysnin, at Ósin og niðasti parturin av Havnará skuldi lokast ("Havnin.", 1928). Tað var í hesum sambandi, at William Heinesen skrivaði brævið, sum eg vísti til í byrjani av greinini, at "Havnará (...) står nu foran sin udslettelse" (*Vinaliga, bind II.*, 2019, s. 105). Í apríl 1929 skrivaði Tingakrossur, at Ósin var burtur ("Ósin hvorvin.", 1929). Í staðin var ein betongbrúgv komin ("Efter Meddelelse", 1929), og dunnurnar mistu sín "Tumleplads" (Gjógv, 1928, s. 2).

Grundin til at áin varð lokað, var fyri at knýta nýggju kaiina, Kongabrúnna, saman við býnum, soleiðis at bilar kundu koyra á hesum strekki. Áarvegurin varð eisini víðkaður nakað, soleiðis at bilarnir fingu betur pláss (Johansen, 2009, s. 18; "Ósin hvorvin.", 1929). Í januar 1930 skrivaði William Heinesen bræv til Jørgen-Frantz Jacobsen, sum hevði búð í Danmark í nøkur ár, og har greiddi William frá at "[b]iltrafikken er også steget ganske imponerende" (*Vinaliga, bind II.*, 2019, s. 257). Í 1933 vóru 39 akfør skrásett í Havn (sí talvu 3).

Býráðslimurin Nyholm Debess bar í 1930 fram á býráðsfundi, sambært frásøgn hjá Føroya Social-Demokrati, "sin Harme angaaende Ødelæggelsen af den idylliske Elv" ("Thorshavn Byraad.", 1930, s. 2). Idylliska áin varð lokað so hvørt (Johansen, 2009, s. 17–19). Føroyatíðindi lýsti broytingina í 1932 soleiðis:

> Tær gomlu býmyndirnar her í Havn hvørva alt meir og meir sum hin nýggi framburðurin leggur til her á landi. (…) Leingi hevur verið talað um, at tørvur er á at breiðka Áarvegin, við at fylla Havnará út og gera hana til veg. Býarstjórnin lýsir til útbjóðing av hesum arbeiði (...). – Tað er ikki løgið, um onkur náttúrelskari, um so má sigast, fellir tárir tá ið hann hoyrur um hesa ætlan býarstjórnsins. (...) At gamalt noyðist víkja fyri nýggjum, er hin gamla søgan uppaftir. ("Havnará.", 1932, s. 2)

Nøkulunda samstundis skrivaði ein annar tó, at: "Breiðkanin av Áarvegi við at útfylla gomlu Havnará, er eitt gott arbeiði" (x., 1932, s. 2).

[8] Eisini Mylláin, ið rann út í Vestaruvág, varð lokað einaferð í 1920-árunum (Jóanesarson, 1985, s. 12).

Sum heild tykist tað at hava verið meiriluti fyri at breiðka og loka Havnará, tí "framburðurin" kravdi tað. Í lesarabrøvum ganga hugtøk sum "fremskridtet", "tann nýggja tíðin", "framburður" og "udviklingen" aftur hesa tíðina, m.a. tá ið tað snýr seg um at loka Havnará. Til tíðir eru hugtøkini nevnd sum nakað jaligt, meðan tey aðrar tíðir er nevnd sum nakað neiligt. Hugtøkini fáa næstan sítt egna lív og tilvit. Tað er sum um, at tað ikki ber til at gera nakað fyri at steðga "framburðinum" og "menningini". T.d. spyr ein retoriskt í lesarabrævi í desembur 1928, tá ið Ósin og Sandurin varð lokaður: "Men Overbygningen af Elven, er det ikke ogsaa et Led i Udviklingen?" og svarar sjálvur: "Jovist er det det" (Gjógv, 1928, s. 2). Tað vóru tó eisini kritisk lesarabrøv, serliga í Tingakrossi. T.d. varð víst á í apríl 1929, at lokanin av Ósanum var eitt "ónytta herverk" og "aftur [er] ein vøkur gomul Havnarmynd horvin" ("Ósin hvorvin.", 1929, s. 2; sí eisini "Frá býarstýrinum.", 1928).

Nevndu hugtøkini verða eisini ofta materialiseraði sum t.d. betong, kai, bilar og vegir, meðan tað idylliska er materialiserað í t.d. trø og (eina reina) Havnará. Fyri summi var Havnará ikki bert ein kloakk, sum skuldi lokast fyri einhvønn prís. Áin var eisini ein partur av býarinnar samleika, eitt estetiskt "idyl" ("Thorshavn Byraad.", 1930, s. 2). Sjálvt navnið á ánni, Havnará á føroyskum og Thorshavns Elv á donskum, vísir eisini, at hon hevur havt mentanarligan týdning. Hon var býarinnar á.[9] Áarvegurin, áin og trøini verða í fleiri keldum lýst sum hugnalig og idyllisk. Rithøvundurin Jørgen-Frantz Jacobsen skrivar í 1930 at: "Alle, som har været i Thorshavn, kender det, Elven, som løber i Træernes Skygge. Det er en ganske særlig elskværdig Atmosfære ved den overgroede Elvevej" (Jacobsen, 1930, s. 3). Her hóma vit ikki kloakklukt, men fáa kensluna av nøkrum hugnaligum. Dálkingin av ánni verður eisini ofta sett í andsøgn til, hvat áin *var* ella *kundi verið*, t.d. tá ið sagt verður, at: "Det har længe været mig og mange andre Byens Borgere en Forargelse, at se det utrolige Griseri, der udfoldes i den ellers saa idylliske Elvstrækning, der løber langs med *Niels Finsens gøtu* og *Áarvegin*." (Borger, 1910, s. 1). Hesar lýsingarnar vísa, at Havnará ikki bert hevði beinleiðis praktiskar funktiónir, men eisini tað, sum vit kunnu kallað rekreativar og samleikaskapandi funktiónir.

## "Den sidste rest af aaen" – størri partur av Havnará lokaður

Í seinnu hálvu av 1940-árunum varð fólksligt trýst lagt á býráðið, tí fleiri ynsktu at loka ánna meira. Longu í mai 1936 var ætlanin at loka størri part av ánni, men hetta hendi ikki fyrr enn fjúrtan ár seinni ("Havnará.", 1936; "»Havnará.", 1950). Og tað varð hildið at vera neyðugt, tí:

[9] Í brævi til William Heinesen lýsir Jørgen-Frantz Jacobsen í 1934 m.a. Havnará soleiðis: "Havnará kommer fra Klubben – og den går til Klubben og den bærer derfor med rette navnet Tórshavns elv, tórshavnsk som den er helt igennem med megen bystemning og megen naturpoesi, netop som en vellykket Klubudflugt. –" (*Vinaliga, bind II.*, 2019, s. 414).

> Havnará er illa viðfarin, í løtuni er hon ein opin esjandi kloakk, ið er til stóra skomm fyri býin. Um summarið luktar hon illa og fleiri fólk halda, at áin í tí skili hon er, beinleiðis vil gerast heilsuskaðilig. […] Tað eru bert tveir kostir at velja ímillum. Annaðhvørt má áin verða rein og eingin óhumska verða koyrd í hana, ella má áin, um hon veruliga framvegis skal verða tann kloakk hon er, leggjast aftur, øll sum hon er, innanfyri býin. ("Ein opin esjandi kloakk", 1949, s. 2)

Fleiri vístu á líknandi tankar í lesarabrøvum.[10] Loysnin gjørdist at loka partar av ánni heldur enn at reinsa hana. Grundirnar vóru sum oftast tvær: 1) Havnará var ein kloakk og luktaði illa, 2) neyðugt var at bøta um vegirnar til bilarnar, og Havnará var í hesum føri ein forðing.

Júst hví tað kom eitt stórt fólksligt trýst at loka ánna í seinnu hálvu av 1940-árunum er ikki heilt greitt. Tað kann vera orsakað av, at tað í 1930-árunum vóru ringar tíðir, og undir Seinna heimsbardaga var annað og týdningarmiklari at hugsa um. Harumframt vóru fólkini og akførini vorðin fleiri. Í 1935 búðu 3.611 fólk í Havn, meðan tað í 1945 búðu 4.390 fólk í Havn (sí talvu 2). Í 1938 vóru 48 akfør skrásett í Havn, meðan tað í 1951 vóru 234 akfør (sí talvu 3). Hetta hevur sannlíkt lagt størri trýst á ánna.

Helst gjørdi trýstið mun, tí í 1950 bjóðaði kommunan privatum at bjóða seg framat at loka ánna fram við Áarvegnum. Arbeiðið var liðugt í septembur 1950 ("Havnará afturlögd", 1950; Viðstein, 1951). William Heinesen vísti á í 1928, at Havnará var í ferð við at verða oyðiløgd, men støða hansara var nakað broytt í 1953: "(...) i fjor tildækkedes den sidste rest af aaen. Det maatte gøres – Havnará (…) var jo forlængst blevet en skiden kloak. Men med den udslettedes et væsentligt træk i byens ansigt" (Heinesen, 1953, s. 76). Hetta var tó heldur ikki seinastu ferð, at áin varð lokað. T.d. varð áin lokað við Vaglið í 1957 ("Lok verður nú lagt yvir Havnará", 1957; "Lokið á Havnará", 1957).

Havnin vaks uppá mangar mátar skjótari enn býarplanleggingin megnaði at fylgja við. Í 1950- og 1960-árunum vaks fólkatalið og talið av húsum, og talan tykist ofta at hava verið um neyðloysnir, har borgarar, sum búðu tætt við ánna, fóru at nýta hana sum frárensl. Áin var lokað so hvørt, tí fólk vóru ónøgd við luktin, og tey ynsktu øktar bilfarleiðir. Lokanin var eisini tongd at fíggjarligu møguleikunum hjá kommununi. Vegir og kloakkering tykist tískil ikki at hava verið partur av eini veruligari býarplanlegging. William Heinesen lýsir væl hesa støðuna: "Uden at fornærme nogen kan man vist godt slå fast, at Tórshavn på ingen måde har kunnet holde trit med sin egen udvikling. Den nyere bebyggelse præges ofte af kaos" (Heinesen, 1958, s. 269–270). Í verkinum Trap frá 1968 varð eisini víst á, at býarmenningin í Havn í stóran mun varð merkt av ruðuleika. Kommunalu myndugleikarnir høvdu, sambært Trap, trupult at fylgja við stóra

[10] Sí eisini (Gamal Havnarmaður, 1947; Ferðamaður, 1948; "Havnará – og ÁARVEGURIN", 1948)

vøkstrinum, og hetta skapti trupulleikar í mun til vegir, vatnveiting og kloakkir (E. V. Joensen, 2017, s. 95–96).

Tað er ikki neyðugt at fara í smálutir við víðari gongdini, men fólkatalið vaks, akførini gjørdust fleiri og nýggj hús vórðu bygd, m.a. í Gundadali. So hvørt hús vórðu bygd við Havnará stóðust ymsir trupulleikar av, at áin varð nýtt sum frárensl til einstøk hús, og tí var aftur neyðugt at loka hana longri og longri niðan eftir. Eisini var mett neyðugt við nýggjari og breiðari vegum ("Vegagerð í Havn.", 1963; "Inniloking av Havnará", 1978), nýggjum fótbóltsvølli (J. F. N., 1972) og at sleppa av við ringa kloakkluktin ("Opin kloakk millum sethús í Gundadali", 1978). Økt fólkatal, fleiri akfør og nýggjar sethúsaútbyggingar nærhendis Havnará skaptu, eins og áður, eitt økt virksemi og trýst á ánna.

Nýggju akførini fingu fólk at krevja nýggjar vegir. Samstundis hava øktu ferðslumøguleikarnir sannlíkt stuðlað uppundir, at fleiri hava keypt sær persónbil. Kanningar frá størri býum vísa, at nýggir høvuðsvegir økja um privatbilismu (Garcia-López et al., 2022). Bilarnir vóru, sum antropologurin Firouz Gaini hevur víst á, "í fokus í Havn" (Gaini & Jacobsen, 2008, s. 247).

Hóast áin varð lokað ymsastaðni, so hvarv lukturin ikki, t.d. var ringur luktur, har Ósin fyrr var ("Havnin skal skína.", 1970; "Dálkingin í Tórshavn", 1972). Í 1970-árunum varð áin summastaðni løgd í tunnil ella stálrør og førd út á sjógv ("Vatnflóð á Kongabrúnni", 1975; "Havnará út í Sersjantavíkina", 1975; "Havnará løgd í stál", 1979). Í 1979 varð víst á í grein í Sosialinum at "[f]yrr var tað soleiðis, at frárenslini úr septikktangunum lógu beint í ánna." Nú var hetta tó bøtt, og í greinini varð víst á, at "[á]in verður ikki longur brúkt sum kloakk" ("Havnará løgd í stál", 1979). Men longu árið eftir vísti ein onnur grein á, at "kloakkir og onnur avlop renna beinleiðis í ánna" ("Fylla næsarnar við kloakk-lukti hvønn dag", 1980).

At frárenslini ikki vóru nóg væl skipað og fóru í ánna bendir á, at nýggju sethúsaútbyggingarnar framvegis vórðu ov illa skipaðar, eins og William Heinesen vísti á í 1958 og Trap vísti á í 1968.

## Tíðarskeiðið áleið 1980-2000: Dreymar um endurskapan

Í hesum parti av greinini verða dreymar og ætlanir um at endurskapa ella lata upp Havnará lýstar. Víst verður eisini á, hvussu dálkingin av ánni, serliga av spillvatni, ávirkaði ætlanirnar at opna ánna.

## At lata upp ella endurskapa

Í 1962 vísti William Heinesen á, at hvørki ung ella eldri vóru kedd um, at Havnará varð lokað: tað yngra ættarliðið mintist hana kortini bert "sum eina ófýsiliga kloakk", og heldur ikki tað eldra ættarliðið legði nógv í (Heinesen, 1962, s. 8). Men okkurt var í ferð við at broytast, tí í 1980-árunum og fram til í dag hava uppskot og kjak verið um at opna ella endurskapa Havnará.

Fyrsta arkitektuppskotið er frá 1984, tá ið ætlanin var at gera eina vatnbyrging, sum skuldi minna um Havnará. Tað var Gunnar Hoydal, býararkitektur, sum teknaði uppskotið ("Vaglið aftur í gomlum stíli", 1984). Frammanundan høvdu einstakar røddir verið frammi um at opna ánna (Samuelsen, 1979; "Finnur Johansen: Gamalt uppskot at opna Havnará aftur", 1984). Í 1984 vísti Dagblaðið á, at "[m]ong hava ynskt seg aftur í gamlar dagar, tá Havnará rann frítt oman gjøgnum Havnina og áðrenn Vaglið varð lagt undir sement" Og víðari at:

> Ynski um at fáa Havnará framaftur hevur seinnu árini verið forðað av teirri orsøk, at Havnará helst ikki hevði verið so tespilig at fingið undan kavi aftur. Men seinastu árini er gjørt nógv við at skipa frárensl frá bústaðarøkjum, og roknað verður við, at innan stutta tíð verður Havnará fullkomiliga rein aftur. ("Vaglið aftur í gomlum stíli", 1984, s. 4)

Ætlanin var tó ikki at opna Havnará, men at gera ein "hyl" ella eitt "basseng" ("Vaglið aftur í gomlum stíli", 1984, s. 4). Talan var tískil ikki um lata ánna upp aftur, men tað snúði seg um at skapa eitt hugsamband við Havnará. Formaðurin í teknisku nevnd hjá kommununi vísti tó á í samrøðu við Tingakross, at: "Í hesum projekti verður skotið upp, at opna havnará aftur, ella ein part av henni, men ikki sum kloakk heldur eina reina og hugnaliga á, sigur Ronald Poulsen" ("Stórmál liggja fyri framman", 1984, s. 2). Tvs. at Ronald Poulsen ynskti, sambært samrøðuni, at opna ánna, og ikki bert gera ein "hyl", so nakað av ósemju var um júst hvat ið skuldi gerast.

Ronald Poulsen vísir á, at Havnará skuldi opnast sum ein rein á, og ikki sum ein kloakk. Omanfyri Sjónleikarhúsið, har Havnará enn var opin, var áin tó ikki rein og hugnalig. Í 1988 staðfesti lívfrøðingur, at áin við skótahúsið í Viðarlundini "[m]á klassast sum opin kloakk". Her var "dygdin av ánni vánalig, oljuluktur saman við kloakklukti, næstan bert livilíkindi fyri ormum" (J. P. Joensen et al., 1988, s. 84). Árini frammanundan var í fleiri umførum roynt at reinsa Havnará, og eisini aðrar áir í kommununi, og at skipa kloakeringina øðrvísi. Kloakeringin snúði seg tó mest um at leiða út á sjógv ("Stórmál liggja fyri framman", 1984; BTy, 1987).

Verkætlanin frá 1984 varð ikki framd, men í 1997, t.e. eftir kreppuna fyrst í 1990-árunum, kom uppskot um at endurskapa Havnará aftur á dagsskrá. Í 1997 ynskti Leivur Hansen, borgarstjóri, at frætta nærri um, hvat ið havnarfólk hildu um at opna ánna. Sjálvur hevði hann hug at lata ánna uppaftur, og Gunnar Hoydal fór til verka aftur (Midjord, 1997a). Sambært nýggju ætlanini hjá Gunnari Hoydal skuldi Vaglið skipast av nýggjum. Havnará skuldi opnast og partur av gongugøtuni skuldi undir glas. Uppskotið varð mett at kosta áleið 20 mió. kr. Av tí at kloakeringin var løgd í rør og harvið ikki rann beinleiðis í ánna, so metti kommunan, at tað fór at verða møguligt at fáa eina reina á, sum kundi geva býnum sín "identitet" og sína "sál" aftur. Sambært uppskotinum skuldi

enduropnaða áin vera so mikið breið og djúp, at áin fór at renna og síl kundu trívast. Áarvegurin, sum nógv orka var løgd í at breiðka, skuldi nú gerast smalari aftur (B. L. Jensen, 1997, s. 3). Ítøkiliga var ætlanin at opna Havnará aftur við Vaglið og við Áarvegin, umframt at fylla sand í Ósan, "har dunnurnar [fyrr] lógu og kvaggaðu" (Hoydal [GH], 1997, s. 6–8).

Ein av fortreytunum fyri at opna Havnará, vóru bøttar kloakkir. "Umleggingar av kloakkum" høvdu, sambært Gunnari Hoydal, "gjørt, at Havnará er rein oman til Sjónleikarhúsið, og skitið vatn rennur ikki longur í Eystaruvág sum fyrr" (Hoydal [GH], 1997, s. 5). Áin var tó ikki rein allastaðni, har hon varð lokað: "Kommunan arbeiðir framhaldandi við at bøta um kloakkskipanina, og tað strekkið av lokaðu ánni, har kloakkir framvegis renna í hana verður í framtíðini umlagt, so tað skitna vatnið rennur fyri seg og tað reina fyri seg" (Hoydal [GH], 1997, s. 5).

Uppskotið frá 1997 elvdi til nógv kjak og lesarabrøv. Sambært Dimmalætting kundu býarinnar borgarar býtast í tríggjar partar: tey, sum stuðlaðu uppskotinum; tey, sum vóru í iva og tey, sum vóru ímóti uppskotinum (B. L. Jensen, 1997). Her skal verða hugt at nøkrum av høvuðssjónarmiðunum.

Ein borgari vísti í lesarabrævi á, at tað vildi vera bæði hugnaligt og samleikaskapandi at opna ánna, og víst varð til Seine í París, Thames í London og til Aarhus. Tann "gamli havnaborgarin" vísti í hesum sambandi til nakað, sum hevur verið víst á fyrr í hesi grein, nevnliga "tíðina" og "menningina":

> Vit minnast aftur á gomlu Havnará – ikki bara tað góða, tí onkuntíð kundi hon anga við ringum deymi. Í dag trúgvi eg ikki, hetta hevði verið so. Men mundi tað ikki vera tíðin, sokallaða menningin, sum kravdi, at hon í síni tíð varð løgd undir heilt fyri at loysa »problemini« - vit fóru um garðin, har hann var lægstur. (Gamal borgari í Havn, 1997, s. 7)

Meðan "menningin" fyrr merkti betong og lokan av ánni tykist menningin nú at vera ein rein og opin á. Hugtakið menning tykist tí at skifta týdning yvir tíð.

Rithøvundurin og tann søguáhugaði Finnur Johansen stuðlaði av fullum huga hugskotinum at opna ánna. Hann var greiður yvir, at tað fór ikki at vera tann upprunaliga, óreguleraða Havnará. Hann vísti á, sum rætt er, at hon eisini var regulerað áðrenn hon varð lokað. Havnin hevði mist sín samleika, tá ið áin varð løgd undir heilt, og samleikin kundi, sambært Finni Johansen, endurskapast við at opna ánna: "Hvør býur hevur síni eyðkenni, og eitt av eyðkennunum fyri Havnina var Havnará. Tá hon verður latin upp aftur, fær Havnin aftur tann identitet, hon misti tá áin, sálin hjá Havnini, varð løgd undir heilt" (Johansen, 1997, s. 13). Her er áhugavert at samanbera við broytingina, sum William Heinesen fór ígjøgnum. Í 1928 var hann ónøgdur við, at Havnará "står (...) foran sin udslettelse" (*Vinaliga, bind II.*, 2019, s. 105). Í 1962 vísti hann hinvegin á, at ongin legði í, um áin var afturlatin. Nú vóru nýggjar røddir frammi, m.a. Finnur

Johansen, sum vísti á, at Havnin hevði mist sín samleika, og at hesin samleiki kundi endurskapast við at opna Havnará.

Summi av teimum, sum vóru ímóti, vóru handilsfólk við Áarvegin. Tey hildu, at tað longu vóru ov fá parkeringspláss, og stúrdu fyri, at tað fór at gerast enn verri at parkera um áin skuldi opnast (Midjord, 1997b). Bilarnir spøktu sostatt enn.

Eitt annað argument, sum í fleiri umførum var frammi, var kostnaðurin og fíggjarstøðan hjá kommununi. Ein spurdi retoriskt í einum lesarabrævi: "Hvaðani eru pengarnir komnir?" Hann endaði sítt lesarabræv við at siga "at hetta er ein ørvitisætlan í verandi støðu". Pengarnir áttu heldur at fara til at loysa "trupulleikan við barnaansingini og til viðlíkahald av vegnum" (Jakobsen, 1997; sí eisini á Dunga, 1997).

## Nýggjar innskriftir við arkitektauppskotunum

Við arkitektauppskotunum hjá Gunnari Hoydal vóru nýggjar innskriftir skaptar. Hetta vóru materiell uppskot, tvs. tekningar, men tey bóru eisini týdningin at lata upp ella at endurskapa ánna. Uppskotini gjørdust tó ikki til veruleika, so til ber at siga, at innskriftin ikki hevði við sær eina umseting frá arkitektauppskoti til endurskapan av ánni. Tey, ið vóru ímóti at endurskapa ánna fingu sín vilja.

William Heinesen var komin til ta niðurstøðu í 1962 at hvørki tað eldra ella yngra ættarliðið legði í, at partar av Havnará vórðu lokaðir. Metingin var møguliga røtt í 1962, men okkurt var broytt, t.d. ynsktu Gunnar Hoydal og Finnur Johansen at opna ánna fyri at skapa lív og trivnað í miðbýnum. Hví nýggj ættarlið høvdu eina øðrvísi áskoðan er trupult at staðfesta. Uppskotini frá 1984 og 1997 er báðumegin kreppuna (fyri 1980- og 1990-árini, sí t.d. J. A. Hansen, 2006, s. 68–151). Í 1980-árunum var nógv virksemi í Føroyum og peningur varð brúktur til nógv ymiskt. Tó at uppskotið frá 1984 ikki varð framt í verki, so kann tað síggjast sum partur av tíðarandanum í 1980-árunum. Tá málið kom fram aftur í 1997 vóru tíðirnar aftur vorðnar betur fíggjarliga aftaná stóru búskaparkreppuna fyrru helvt av 1990-árunum. Tá ein líknandi verkætlan varð framd í 2021-2023 vóru tíðirnar eisini fíggjarliga góðar. Tað snýr seg tó neyvan bert um pening. Tað tykist at snúgva seg um eina søguliga nostalgi, har áin verður lýst sum "sál" og "samleiki" hjá Havnini. Møguliga er talan eisini um eitt ynski um atgongd til náttúru inni í einum stórum býi, sum Havnin í einum føroyskum samanhangi varð vorðin til.

Mynd 4.
Brot av korti av Havn og partvíst Argir og Hoyvík, kortlagt í 1984, útgivið í 1989.
© Historiske kort, Styrelsen for Dataforsyning og Infrastruktur




## Tíðarskeiðið 2021-2024: "Ein nýggj og nútímans á" verður skapt

Ætlanir og kjak um at endurskapa ella opna Havnará endaðu tó ikki[11] og nú (vit skriva 2024) er ein vatnbyrging gjørd á Vaglinum, sum skal skapa eitt hugsamband til Havnará. Sambært tíðindaskrivi frá kommununi "fevnir" uppskotið hjá arkitektafelagnum um "eina nýggja og nútímans á" (*Soleiðis kemur Havnará at síggja út í miðbýnum*, 2022). Hon leiðir vatnið aftur og fram og er løgd omaná, har partur av ánni fyrr var (Djurhuus, 2022; F. Jensen, 2022). Av tí sama hava summi speirekandi kallað hana fyri "Omaná" (U. L. Hansen, 2023).

Verkætlanin at endurskapa ánna fekk loksins undirtøku í býráðnum í 2021 og 2022, tá ið peningur varð játtaður til endamálið. Politiskt var "ynski um at

[11] Sí t.d. (*Tórshavn Byatlas. Grønne træk*, 2006; Hoydal et al., 2012, s. 10–11, 14–15, 18–19; Skipan av Gundadali, 2019, s. 7, 13–14)

raðfesta miðbýin" fyri at økja um trivnaðin. Eitt ynski var at lata part av Havnará "uppaftur" (*GERÐABÓK*, 2021, s. 161). Í fyrstu atløgu varð ein millión játtað til neyðugar kanningar og til at fyrireika verkætlanina (*GERÐABÓK*, 2021, s. 162–163).

Tó at Gunnar Hoydal í 1997 vísti á, at kommunan arbeiddi við at bøta um kloakkskipanina, soleiðis at skitið vatn rann fyri seg og reint vatn fyri seg (Hoydal [GH], 1997, s. 5), so bendu úrslit á, at eisini í 2022 var kloakkvatn í ánni. Trupulleikin við dálking í Havnará er ikki bastur enn. Hetta benda ávaringarskeltir fram við ánni í Viðarlundini boð um: "Vatnið í ánni er dálkað! / Tí verður mælt frá at spæla í ánni." Lívfrøðiligar kanningar vístu summarið 2022, at áarvatnið í ánni omanfyri Sjónleikarhúsið var dálkað við E. Coli og koliformum bakterium. Harumframt var áarvatnið, har Havnará eftir ætlan skuldi latast upp, "sera illa dálkað, og úrslitið bendir á, at kloakkvatn rennur í ánna" (*GERÐABÓK*, 2022, s. 613).

Umsitingin í kommununi metti tí ikki, at tað var "ráðiligt, sum umstøðurnar eru í dag [t.e. í 2022]" at opna ánna aftur. Tískil tók verkætlanin "støði í at gera eina á oman á verandi Havnará" Í 2017 varð ein skráseting gjørd av írenningum, sum eru knýttar at Havnará frá Sjónleikarhúsinum og oman til Etika á Áarvegnum. 317 leiðingar vórðu skrásettar, og av hesum vóru 70 kloakkleiðingar. Leiðingarnar vóru í flestu førum gomul betong- og leirrør. Í støðum kom mannatrekkur úr leiðingunum og aðrastaðni var nógv feitt at síggja. Mett var í 2017 at áleið ein triðingur av teimum 70 kloakkleiðingunum høvdu brot ella rivur. Um dekkið skuldi takast av ánni fór tað at vera ein "avbjóðing" og tað "fer at lukta í miðbýnum" (*GERÐABÓK*, 2022, s. 612–613).

Avgerð varð tí tikin, um at gera eina vatnbyrging omaná Havnará við Løgtingshúsini. Samlaði kostnaður av verkætlanini gjørdist áleið 15 milliónir krónur (*GERÐABÓK*, 2022, s. 613–614; *GERÐABÓK*, 2023, s. 625–626).

Til at játta fyrstu milliónina og seinni tær 12 milliónirnar atkvøddu 12 býráðslimir fyri, og ein ímóti. Tey, sum stuðlaðu ætlanini vístu á, at tað fór at skapa trivnað í miðbýnum. Formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini Tróndur Sigurðsson vísti á í viðgerð av málinum, "at eg vænti at hetta fer at vera eitt óalmindeliga gott býarrúm fyri Havnina". Hann vísti harumframt á týdningin av, "at vit fáa hoyra eina á renna í Havn, her mitt inni í býnum, er heilt fantastiskt" (*Býráðsfundur 22. juni 2022*, 2022). Einasti býráðslimur, sum atkvøddi ímóti, var umhvørvis- og veðurlagsaktivisturin Elsa Berg.[12] Hon ynskti heldur at nýta peningin til dagstovnsøkið og til átøk á umhvørvis- og veðurlagsøkinum (F. Jensen, 2022).

Tankarnir um at endurskapa Havnará tykjast sostatt at verða komnir á mál á hesum sinni og innskriftin at lata Havnará upp, ella at endurskapa ánna er nú vorðin til ein hyl á Vaglinum. "Omaná" er tann nýggjasta innskriftin av Havnará. Við "Omaná" er hugsambandið til ánna menniskjaskapt við beinum strikum,

[12] Eftir at greinin er skrivað er Elsa Berg vorðin borgarstjóri.

stoyptum botni, tamarhald er á mongdini av vatni í hylinum, sum verður flutt aftur og fram, og ongin síl liva í henni. Ein slík nýggj og nútímans á, sum kommunan hevur kallað hana (*Soleiðis kemur Havnará at síggja út í miðbýnum*, 2022), kann tulkast sum ein roynd at skapa náttúru, ella at fáa fullkomiligt tamarhald á náttúru. Tað tykist, sum at politiska skipanin metir, at tað er fíggjarliga ov kostnaðarmikið at endurbøta dálkaðar áir og náttúru, og tí verður givið upp frammanundan. Tá er náttúran við sviðu soð. Spurningurin er, hvørt Havnin hevur fingið sín "samleika" og sína "sál" aftur við "Omaná"? Hvussu er og ikki, so hava røddir verið frammi um at halda áfram "eftir nøkulunda sama leisti", t.e. at gera ein hyl omaná veruligu ánna, framvið Amtmansgarðinum og oman til Kongabrúnna, sum gjørt er á Vaglinum (Mortensen & Sigurðsson, 2024).

## Niðurstøða

Ein nágreinilig søga sum hendan um tað ítøkiliga samspælið millum menniskju og eitt ávíst náttúrufyribrigdi kann varpa ljós á nakrar av teimum mongu náttúrufatanum, sum til einahvørja tíð eru, og hvussu tær broytast og hvønn týdning tær hava. Í hesi grein havi eg víst á, at Havnará hevur havt ymiskan týdning og fatanirnar av ánni eru broyttar gjøgnum tíðina. Samstundis er áin broytt gjøgnum tíðirnar.

Tað vóru ikki bert menniskjuni, sum vóru týdningarmiklir aktørar í samspælinum millum ánna og umhvørvið. Eisini náttúrufyribrigdi sum áin sjálv, veður, bakteriur og djór høvdu týdning. Samstundis hevði tøkni og tilfar sum bilar, betong o.l. stóra ávirkan á, hvussu Havnará varð broytt.

Tað hevði stóran týdning, at Havnará var rein, tá ið hon var matará og tváttá. Tað var tó ofta trupult at halda hana reina, m.a. orsakað av nógva flogfenaðinum í býnum. Fólk ynsktu tí eina nýggja vatnveiting. Við nýggju vatnveitingini frá 1898, har vatn varð tikið aðrastaðnis, fóru fólk í størri mun at nýta Havnará sum frárensl, og hetta skapti ringan lukt.

Tá bilar komu til Havnar í 1920-árunum varð hildið, at neyðugt var at knýta býin saman við nýggjum vegum. Partar av ánni vóru tí lokaðir í stigum frá 1920-árunum og fram. Argumentini fyri at loka ánna vóru tvey: hon var dálkað og krav var um vegir til bilarnar. Sum heild tykist tað sum, at meiriluti var fyri at breiðka vegirnar og loka ánna. Ofta varð víst á, at "framburðurin" ella "tann nýggja tíðin" kravdi tað. Summi vóru tó eisini ímóti at loka ánna, og tey vístu m.a. á høgan kostnað, men eisini at áin var idyllisk.

Í 1980- og 1990-árunum fóru fólk at tosa um at endurskapa ein part av ánni. Tó fekst undirtøka ikki fyri at endurskapa ánna. Tey, sum vóru fyri at endurskapa ánna vístu á hugna og samleika, meðan tey, sum vóru ímóti, vístu á høgan kostnað, annan tørv og væntandi parkeringspláss. Kjakið minnir um kjakið sum aftur hevur verið í sambandi við nýggju verkætlanina at endurskapa Havnará. Á hesum sinni kom verkætlanin á mál. Úrslitið gjørdist, at ein hylur er lagdur omanyvir, har Havnará rennur, sum skal skapa eitt hugsamband til Havnará.

Fyri framtíðar býarplanlegging og sum frásjón av hesi grein ber til at vóna og mæla til, at náttúra verður vard, og at hugtøk sum endurbøting, býarnáttúra og regenerativ náttúra fáa størri pláss í almenna kjakinum. Tað er týdningarmikið, at bæði fólk, fæ og náttúra trívast.

## Bókmentir og keldur

á Dunga, B. (1997). Opið bræv til Leiv Hansen, borgarstjóra, viðvíkjandi Havnará. *Dimmalætting*, *120. árgangur* (49), 7.

Blok, A., & Jensen, T. E. (2011). *Bruno Latour: Hybrid Thoughts in a Hybrid World*. Routledge, Taylor & Francis Group.

Borger. (1902). Thorshavns Kloak. *Tingakrossur*, *2. Aargang* (33), 2.

Borger. (1910). Byens Kloak. *Tingakrossur*, *10. Aarg.* (29), 1.

Brendstrup. (1883). Bekjendtgjørelse. *Dimmalætting*, *6te Aargang* (44), 2.

Brendstrup, Evensen, J. P., Lützen, J., Effersø, D. B., Jacobsen, J., & Johansen, E. (1883). Bekjendtgjørelse. *Dimmalætting*, *6te Aargang* (44), 2.

BTy. (1987). Øðrvísi umhvørvispolitikk. *Dagblaðið*, *53. árg.* (27), 9.

*Býráðsfundur 22. juni 2022*. (2022, juni 22). [Sjónbandaupptøka]. https://broadcast.avc.dk/thk/vod.html

Býráðsóhumska í Havnará. (1950). *14. September*, *4. árg.* (41), 4.

Chambers, R. (1856). *Tracings of Iceland and The Faroe Islands*. W. & R. Chambers.

Christophersen, B. (1891). Hr. Redaktør! *Dimmalætting*, *14de Aargang* (46), 3.

Dálkingin í Tórshavn. (1972). *14. September*, *26. árg.* (215), 2.

Debess, N. (1927). Gamlar Havnamyndir. I. Stóridammur. *Tingakrossur*, *27*(31), 2.

Djurhuus, H. (2022, 09). *Arbeiðið við ánni er byrjað*. Kringvarp Føroya. https://kvf.fo/node/144705

Efter Meddelelse. (1929). *Dimmalætting*, *52. Aargang* (40), 2.

Ego. (1891). Hr. Redaktør! *Dimmalætting*, *14de Aargang* (45), 2.

Ein opin esjandi kloakk. (1949). *Dagblaðið*, *15. árgangur* (92), 2.

En Trømand. (1901a). Tab og Erstatning. *Tingakrossur*, *1. Aargang* (6), 2.

En Trømand. (1901b). Thorshavns Elv. *Tingakrossur*, *1. Aargang* (7), 2–3.

Engelstoft, & Finsen. (1907). Licitation. *Dimmalætting*, *30te Aargang* (52), 4.

Engelstoft, L. C. T. (1901). Thorshavns Elv. *Dimmalætting*, *24de Aargang* (6), 1–2.

Evensen, J. P. (1883). Referat af Thorshavns Borgerrepræsentations Forhandlinger. *Dimmalætting*, *6te Aargang* (36), 2–3.

Evensen, J. P. (1884). *Referat af Thorshavns Borgerrepræsentations Forhandlinger. 7de Aargang* (49), 2–3.

Faber, E. (1982). >>Í gjár í ánni—Í dag í fiskinum<< (B. Jákupsson, týðari). *Mondul*, *8. árg.* (1), 3–8.

Ferðamaður. (1948). Ferðaviðurskifti í Havnini. *Tingakrossur*, *48. árg.* (33), 1–2.

Finnur Johansen: Gamalt uppskot at opna Havnará aftur. (1984). *Dimmalætting*, *107. árgangur* (52), 1.

Frá býarstýrinum. (1928). *Tingakrossur*, *28. árg* (23), 3.

Fritzbøger, B. (2009). *Vandets veje: Skjern Ås miljøhistorie gennem 350 år.* (1. udgave.). Gyldendal.

Fylla næsarnar við kloakk-lukti hvønn dag. (1980). *Oyggjatíðindi*, *4. árgangur* (61), 2.

Gaini, F., & Jacobsen, H. (2008). *Mynstur broytast: Landsverk bygt land í 60 ár*. Landsverk.

Gamal borgari í Havn. (1997). Býarmyndin. *Dimmalætting*, *120. árgangur* (35), 7.

Gamal Havnarmaður. (1947). Hásummardagar í Havn. *Dagblaðið*, *13. árgangur* (41), 1.

Garcia-López, M.-À., Pasidis, I., & Viladecans-Marsal, E. (2022). Congestion in highways when tolls and railroads matter: Evidence from European cities. *Journal of Economic Geography*, *22*(5), 931–960. https://doi.org/10.1093/jeg/lbab025

*GERÐABÓK*. (2021, februar 25). Tórshavnar kommuna. https://www.torshavn.fo/media/m35ocixb/ger%C3%B0ab%C3%B3k-fyri-b%C3%BDr%C3%A1%C3%B0sfundin-25-februar-2021.pdf

*GERÐABÓK*. (2022, juni 22). Tórshavnar kommuna. https://www.torshavn.fo/media/hmwelf2v/ger%C3%B0ab%C3%B3k-fyri-b%C3%BDr%C3%A1%C3%B0sfundin-22-juni-2022_edit.pdf

*GERÐABÓK*. (2023, juni 21). Tórshavnar kommuna. https://www.torshavn.fo/media/izanpfxk/ger%C3%B0ab%C3%B3k-fyri-b%C3%BDr%C3%A1%C3%B0sfundin-21-juni-2023.pdf

Gjógv. (1928). Bli’r de’ til no’et? *Føroya Social-Demokrat*, *2. árg.* (49), 2–3.

Hansen, J. A. (2006). Bankarnir í 100 ár. Í J. A. Hansen & J. P. Joensen (ritstj.), *Føroyar og bankarnir í 100 ár*. Føroya Banki.

Hansen, U. L. (2023, juli 21). *Sí myndirnar: Nýggja Havnará hugtekur havnarfólk*. Kringvarp Føroya. https://kvf.fo/netvarp/ms/2023/07/21/si-myndirnar-nyggja-havnara-hugtekur-havnarfolk

Havnará. (1932). *Føroyatíðindi*, *18. Aargang* (18), 2.

Havnará. (1936). *Dagblaðið*, *2. árg.* (47), 4.

»Havnará. (1950). *Dagblaðið*, *16. árgangur* (34), 4.

Havnará – og ÁARVEGURIN. (1948). *Dagblaðið*, *14. árgangur* (96), 1.

Havnará afturlögd. (1950). *14. September*, *4. árg.* (53), 4.

Havnará løgd í stál. (1979). *Sosialurin*, *52. árgangur* (86), 16.

Havnará út í Sersjantavíkina. (1975). *Sosialurin*, *48. árgangur* (52), 1.

Havnaverkið í Havn. (1926). *Tingakrossur*, *26. árg.* (37), 1–3.

Havneanlægget ved Thorshavn. (1925). *Dimmalætting*, *48. Aargang* (32), 1.

Havnen i Thorshavn. (1928). *Dimmalætting*, *51. Aargang* (17), 3.

Havnin. (1928). *Dimmalætting*, *51. Aargang* (33), 3.

Havnin skal skína. (1970). *Tingakrossur*, *65. árg.* (24), 3.

Heinesen, W. (1958). Tórshavn. Í *Færøerne II.* (s. 259–277). Udgivet af Dansk-færøsk samfund, i kommission på Det Danske Forlag.

Heinesen, W. (1962). Havnará. Í *Følv* (s. 8–12). Pól Arni-Joensen, Oskar Hermannsen.

Heinesen, W. (við Av Reyni, I.). (1953). *Tann deiliga Havn* (J. Davidsen, týðari). P.F. H. N. Jacobsens bókahandil.

Holm. (1888). Bekjendtgjørelse fra Politiet. *Dimmalætting*, 4.

Holm. (1894). Bekendtgørelse fra Politet. *Dimmalætting*, *17de Aargang* (38), 4.

Hoydal, G., Skjold, M., Jacobsen, Ó., & Mortensen, H. (2012). *Havnin innan fyri Stóragarð: Hugsjónir og dreymar*. https://issuu.com/festifo/docs/havnin

Hoydal [GH], G. (1997). *Miðbýurin í framtíðini. Havnará*. Byggi- og býarskipanardeild býráðsins.

Inniloking av Havnará. (1978). *14. September*, *32. árg.* (6), 12.

Isholm, E. (2013). Pløyen toldi ikki luktin í Havn. *Vikuskifti*, *31*, 10–11.

J. F. N. (1972). Tilráðing frá stadionnevndini. *Sosialurin*, 2.

Jacobsen, J.-F. (1930). Tórshavn. *Tingakrossur*, *30. árg* (33), 3.

Jakobsen, H. (1997). Ætlanin við Havnará. *Dimmalætting*, *120. árgangur* (123), 7.

Jensen, B. L. (1997). Rasmus Effersøe má víkja fyri Havnará. *Dimmalætting*, *120. árgangur* (121), 3.

Jensen, F. (2022, 09). *12 milliónir fyri 100 metrar av á*. Kringvarp Føroya. https://kvf.fo/node/144725

Jóanesarson, E. (1985). *Staðarnøvn í Havn: Á strekkinum úr Vágsbotni út í Sandagerði*. Exam.art. serritgerð í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum. Ikki givin út. Tøk á Føroya Landsbókasavni.

Joensen, E. V. (2017). Havnin við havið var hon einaferð: Ein býur er fluttur heimanífrá. *Varðin*, *84* (2), 84–109.

Joensen, J. P. (1975). *Færøske sluppfiskere. Etnologisk undersøgelse af en erhversgruppes liv*. Føroya Fróðskaparfelag.

Joensen, J. P. (2020). *Í stovuni sofu, í køki komfýr, 1. bind. Bústaðarviðurskifti og sethús til umleið 1960: Ein etnologisk lýsing* (Bd. 1). Sprotin.

Joensen, J. P., Poulsen, M., Nørrevang, A., & Lützen, F. (ritstj.). (1988). *Kanning av dálkingarstøðuni á vágni og í teimum størru áunum í Tórshavn*. Býarverkfrøðingurin.

Johannesen, B. (2008). *Havnin—Fólk og yrki 1940-1969*. Egið forlag.

Johannesen, P. C., Winther, M. A., & Samuelsen, Andr. (1909). *Dimmalætting*, *32te Aargang* (7), 4.

Johansen, F. (1997). Havnará er sálin hjá Havnini. *Sosialurin*, *71. árgangur* (126), 13.

Johansen, F. (1998). *Vatnveitingin í Tórshavn í 100 ár: 1898-1998*. Tórshavnar Býráð.

Johansen, F. (2006). *Traðkaðu fólkinum slóð. Havnin 1860-1900*. Egið forlag.

Johansen, F. (2009). *Traðkaðu fólkinum slóð 2. Havnin 1900-1940*. FJohansen.

*Lagtingstidende (Sagreferat). Den ordinære Samling 1922*. (1923). Trykt i „Færø Amtstidende"s Bogtrykkeri.

Landslæknin. (1950). *14. September*, *4. árg.* (43), 1–2.

Latour, B. (1990). Technology is society made durable. *Sociological Review*, *38* (1), 103–131.

Latour, B. (1996). On actor-network theory: A few clarifications. *Soziale Welt*, *47* (4), 369–381.

Latour, B. (2005). *Reassembling the Social: An Introduction to Actor-Network-Theory*. Oxford University Press.

Law, J. (2019, januar 30). *Material Semiotics* [Www.heterogeneities.net/publications/Law2019MaterialSemiotics.pdf].

Lok verður nú lagt yvir Havnará. (1957). *14. September*, *11. árg.* (48), 4.

Lokið á Havnará. (1957). *14. September*, *11. árg.*(78), 3.

McNeill, J. R. (2000). *Something new under the sun: An Environmental History of the Twentieth-Century World* (1. publ. as a Norton paperback). Norton.

Midjord, D. (1997a). Leivur Hansen hug at lata Havnará uppaftur. *Dimmalætting*, *120. árgangur* (37), 1.

Midjord, D. (1997b). Uppskot á veg um Áarveg og Havnará. *Dimmalætting*, *120. árgangur* (161), 1.

Mitens, Edw. (ritstj.) (við Sørensen, Chr. L.). (1953). *Føroyskt lógsavn. Umfatandi serstakar føroyskar lógir og administrativar fyriskipanir 1687-1953*. Mentunargrunnur Føroya Løgtings.

Mortensen, H., & Sigurðsson, T. (2024, februar 13). *Vilja hava nýggju ánna oman til Kongabrúnna*. VP.fo. http://www.vp.fo/news/vilja-hava-nyggju-anna-oman-til-kongabrunna

*Motorkøretøjer 31. December 1951* (Bd. 153, 3. Hæfte). (1954). Det Statistiske Departement.

Müller, S. E. (1885). Bekjendtgjørelse. *Dimmalætting*, *8de Aargang* (41), 4.

Nolsøe, J. P. A., & Jespersen, K. (2004). *Havnar søga I*. Tórshavnar kommuna.

Nolsøe, J. P. A., & Jespersen, K. (2009). *Havnar søga 4*. Tórshavnar kommuna.

Nolsøe, J. P. A., & Jespersen, K. (2023). *Havnar søga 6*. Tórshavnar kommuna.

Nónklett, T. P. (2020). *Thorshavns Elv. En miljøhistorie* [Område C: historisk område med projektplanlægning, Københavns Universitet]. Ikki givin út.

Nónklett, T. P. (2021). *Vandet løber stadig gennem Thorshavns Elv. En miljøhistorisk undersøgelse af en færøsk elv årene ca. 1800-2000* [Kandidatritgerð, Københavns Universitet]. Ikki givin út.

Opin kloakk millum sethús í Gundadali. (1978). *Sosialurin*, *51. árgangur* (7), 1.

Ósin hvorvin. (1929). *Tingakrossur*, *29. árg* (16), 2.

Ronald Poulsen, formaður í teknisku nevnd: Stórmál liggja fyri framman—Og vit mugu í gongd beinanvegin. (1984). *Tingakrossur*, *79. árg.* (51), 2.

Samuelsen, S. (1979). Føroya størsta kloakk. *Tingakrossur*, *74. árgangur* (20), 5.

*Skipan av Gundadali. "Heildarætlan fyri virksemið í Gundadali"*. (2019). Tórshavnar kommuna; MAP Arkitektar.

*Soleiðis kemur Havnará at síggja út í miðbýnum*. (2022, 06). Tórshavnar kommuna. https://www.torshavn.fo/tidindi/soleidis-kemur-havnara-at-siggja-ut-i-midbynum

*Statistiske Efterretninger: Bd. 25. Aarg.* (1933). Det Statistiske Departement.

*Statistiske Efterretninger: Bd. 30. Aarg.* (1938). Det Statistiske Departement.

Sørensen, Th. (1913). Fremskridt paa Færøerne i de sidste 25-30 Aar. Foredrag i Foreningen >>De danske Atlanterhavsøer<< den 16. Decbr. 1912. I *Færøerne*. Trykt i >>Færø Amtstidende<<s Bogtrykkeri.

Thorshavn Byraad. (1930). *Føroya Social-Demokrat, 4. árg.* (33), 2.

Thorshavner. (1901). Vandledningen. *Tingakrossur, 1. Aargang* (24), 2.

Thorshavns Vandbeholder. (1881). *Dimmalætting, 4de Aargang* (44), 4.

Thorshavns Vandforsyning. (1896). *Dimmalætting, 19de Aargang* (33), 1–2.

*Tórshavn Byatlas. Grønne træk*. (2006, november 10). Reg. SA, Nr. 19. Tilgængeligt på www.torshavn.fo.

*Tórshavnar býaratlas. Hús og býarumhvørvi í Tórshavn 2007*. (2007). Tórshavnar kommuna.

Vaglið aftur í gomlum stíli. (1984). *Dagblaðið, 50. árg.* (33), 4.

Vandledning i Thorshavn. (1896). *Dimmalætting, 19de Aargang* (17), 1.

Vatnflóð á Kongabrúnni. (1975). *Dimmalætting, 98. Aargang* (86), 1.

Vegagerð í Havn. (1963). *Dimmalætting, 86. Aargang* (19), 4.

Viðstein, M. S. (1951). VILHELM TÓRSHEIM. 24. Desbr. 1881 – 24. Desbr. 1951. *Dagblaðið, 17. árgangur* (109), 2.

*Vinaliga, bind II. Brævaskiftið millum William Heinesen og Jørgen-Frantz Jacobsen, 1920-1938* (Fyrsta útgáva, fyrsta upplag, 1–2) (við Jógvani Isaksen). (2019). Sprotin.

Vore sanitære Forhold. (1912). *Tingakrossur, 12. Aarg.* (26), 1.

West, J. F. (1974). *Færøerne. En nation og dens historie* (P. Koch, Overs.). Gyldendal.

Worster, D. (1988). Appendix: Doing Environmental History. Í D. Worster (ritstj.), *The Ends of the Earth: Perspectives on Modern Environmental History* (s. 289–307). Cambridge University Press.

x. (1932). Kommunal arbeiði. *Føroyatíðindi, 18. Aargang* (25), 2.

Ziska, A. J. (1959). *Tórshavn. Lív og vøkstur.*

*Årbog for Færøerne 1976.* (o.á.). Færøernes landsstyre. Rigsombudsmanden på Færøerne.

*Årbog for Færøerne 1978.* (o.á.). Færøernes landsstyre. Rigsombudsmanden på Færøerne.

*Årbog for Færøerne 1980.* (o.á.). Færøernes landsstyre. Rigsombudsmanden på Færøerne.

*Årsberetning 1965.* (1966). Rigsombudsmanden på Færøerne.

*Årsberetning 1968.* (1969). Rigsombudsmanden på Færøerne.

*Årsberetning 1971*. (1972). Rigsombudsmanden på Færøerne.

*Årsberetning 1972*. (1973). Rigsombudsmanden på Færøerne.

*Årsberetning 1974*. (1975). Rigsombudsmanden på Færøerne.